FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið - Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
04. august 2006
Mál.: 200600571 / 9
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: HEJO

Tygara skriv:

# Fíggjarnevndarskjal

## a. Inngangur

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum søkir við hesum Fíggjarnevndina um at hækka játtanina til høvuðskontu 5.11.1.05. Fiskimálaráðið *(Rakstrarjáttan)* við 3.076 tkr.

## b. Málsfrágreiðing

Fiskimálaráðið varð 4. juli 2006 í máli nr. BS 1283/2003 í Føroya Rætti dømt at rinda Sp/f Nakki, Klaksvík, kr 2.559.633,67 umframt rættargangsrentu fyri tíðarskeiðið 2. oktober 2003 til 1. august 2006 áljóðandi kr 515.398,02. Upphæddin skuldi rindast innan 18. juli 2006. Sp/f Nakkur kravdi 10.705 tkr í endurgjaldi frá Fiskimálaráðnum tí Fiskimálaráðið hevði tikið fiskiloyvi aftur.

### 5.11.1.05. Fiskimálaráðið *(Rakstrarjáttan)*

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 13.264 | 3.076 | 16.340 |
| Útreiðslujáttan | 13.764 | 3.076 | 16.840 |
| Inntøkujáttan | 500 | - | 500 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| **Útreiðslur** | **12.964** | **3.076** | **16.040** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | 3.076 | 3.076 |
| **Inntøkur** | **500** | **-** | **500** |

Ministry of Fisheries and Maritime Affairs
Heykavegur 6 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

**c. Grundgeving fyri framløgu**

Orsøkin til at hetta mál hevur skund og verður framlagt nú er, at dómurin frá Føroya Rætti álegði Fiskimálaráðnum at rinda endurgjaldið innan 14 dagar frá 4. juli 2006 at rokna.

**d. Uppskotið**

Vísandi til omanfyri standandi, verður søkt um eykajáttan 3.076 tkr. til høvuðskontu 5.11.1.05. Fiskimálaráðið *(Rakstrarjáttan),* soleiðis, at á eykafíggjarlógini 2006 verður tikið við:

**§ 5 Fiskimálaráðið**

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| **5.11.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 05. | Fiskimálaráðið (Rakstrarjáttan) | J | 13.764 | -500 |
| | | **EYJ** | 3.076 | - |

**e. Tilsøgn frá Fíggjarmálastýrinum**

Fíggjarmálaráðið hevur givið tilsøgn til, at umsóknin verður send Fíggjarnevndini, av tí at málið hevur skund.

**Váttað:**

**Bárður Nielsen**
**landsstýrismaður**

/

**Terje Petersen**
**fulltrúi**

**Bjørn Kalsø**
**landsstýrismaður**

/

**Rógvi Reinert**
**aðalstjóri**